# yvir 60 arbeiðspláss í Vági

ELDRARØKT
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Eitt nýtt røktarheim í Vági fer at skapa trygg, almenn arbeiðspláss, sum vit hava harðliga brúk fyri.

Tað var ein grundgeving hjá borgarstjóranum, Kirstin, Strøm Bech á býráðsfundi í Vági fríggjakvøldið, tá ið hon heitti á býráðið um at samtykkja eituppskot um at Vágs Kommuna skuldi søkja landsstýrið um stuðul til at byggja ellis- og røktarheim í Vági saman við sumbingum, porkenningum og hovbingum.

Sum tað sæst í aðrari grein í blaðnum, varð uppskotið samtykt.

Kirstin Strøm Bech segði, at tað, sum lá í kortinum, var at søkja um stuðul til eitt heim við 32 plássum.

Talan skuldi bæði vera um eitt ellis- og røktarheim og um eitt heim til minnisveik. Men talan skuldi eisini vera um pláss til umlætting.

– Á einum slíkum heimi eru eini 39 fulltíðar arbeiðspláss, men av tí, at nógv arbeiða niðursetta tíð á hesum øki, verður mett, at talan verður um eini 62 starvsfólk á einum slíkum heimi.

Hon vísti eisini á, at tað var harðliga brúk fyri arbeiðsplássum til konufólk í Suðuroy.

Í uppskotinum, sum býráðið samtykti fríggjakvøldið, liggur eisini, at møguleikin skal standa opin fyri at Tvøroyri, Hvalba og Fámjin kundi koma upp í verkætlanina seinni.

Hon duldi ikki fyri, at hetta var eitt hjartamál hjá henni, tí hon helt, at tað hevði stóran týdning at skipa so fyri, at tey eldru kundi verða verandi í nærumhvørvinum.

## Eggja kvinnum at fara í skúla

Hans Joensen, býráðslimur, sum var ímóti ætlanini, metti, at tað fór at vera torført at fáa starvsfólk til øll hesi arbeiðsplássini.

Í hesum sambandi varð víst á, at heilsuskúlin byrjar í ár at taka næmingar upp til tað víðkaðu útbygvingina og borgarstjórin helt ikki, at tey kundu lata vera við at byggja, bara tí at tey ikki væntaðu at fáa starvsfólk.

Tvørturímóti metti hon, at júst hetta fór at eggja nógvum kvinnum at fara á heilsuskúlan.

Hon vísti eisini á, at ein kanning vísir, at tørvur er á 33 búplássum til eldri í Suðuroy og at fólkasamasetingin er so, at hesin tørvur fer bara at veksa.



Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági, duldi ikki fyri, at ellis- og røktrheimið í Vàgi er eitt hjartalmál hjá henni, bæði fyri at bøta um eldrarøktina og sum arbeiðsskapandi tiltak, serliga til konufólk

# t í Vágs Býráð

og røktarheim í Vági. Men tað skuldi vera eitt felags ellisheim fyri allar oynna, har allar kommunurnar skuldu vera við. Hon hevur sostatt ikki fingið heimild at fara undir eina slíka ætlan saman við nøkrum fáum kommununum.

Dánjal Bjarkhamar førdi fram, at eftir kommunuskipanini kundi býráðið ikki samtykkja eitt mál, fyrrenn avvaraðndi býráðsnevndir høvdu viðgjørt tað fyrst og høvdu gjørt síni til tilmæli til býráðið.

Eisini Jógvan Krosslá førdi fram, at Vágs Kommuna er ein nevndarstýrd kommuna, sum sigur, at øll mál skulu fyri í nevnd, áðrenn tey kunnu verða løgd fyri býráðið til støðutakan

Tað er ikki gjørt í hesum føri og tí er viðgerðin ólóglig, helt hann fast um.

Tí skeyt hann upp, at málið verður beint aftur í nevnd til viðgerðar, áðrenn býráðið tekur støðu. Hann mælti eisini til, at í hesum sambandi skuldi málið kannast. Eitt nú skuldi byggi- og rakstrarkostnaður kannast og ikki minst skuldu útreiðslurnar til eitt ellisheim samanberast við útreiðslurnar til at byggja upp í sambýlið.

Í hesum sambandi sipaði hann til, at býráðið fyri tveimum árum síðani samtykti at søkja landið um stuðul til at byggja sambýlið út, so at pláss verður fyri 10 fólkum afturat. Hann mælti tí til, at kostnaðurin at byggja ellis- og røktarheim, verður samanborin við kostnaðin at byggja sambýlið út.

## Serligan týdning

Borgarstjórin svaraði aftur, at freistin at søkja um stuðul úr landkassanum til at byggja ellis- og røktrheim, úti í morgin. Og er talan um mál, sum hava serligan týdning, hevur hon heimild at leggja tey fyri býráðið og at fáa tey viðgjørd.

Tað metti hon at hetta málið hevði, tí málið hevur skund fyri at kunna halda umsóknarfreistina.

Hon vísti eisini á, at nevndirnar hjá býráðnum koma upp í arbeiðið seinni, tá ið ætlanin skal nágreinast.



– Minnlutin í Vágs Býráð gjørdi hvat hann kundi fyri at fáa býráðslimir at atkvøða ímóti at byggja ætlaða ellis- og røktarheimið í Vági. Høgrumegin frá sita Hans Joensen, Jógvan Krosslá og Dánhal Bjarkhamar. Fjórðu býráðslimurin er Eyðfinn Mørk, sum tekur undir við ætlanini og við rygginum til, Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri

# byggja ellis- og røktarheim í Vági

í Suðuroy, er ikki fíggjarligt grundarlag fyri at byggja eitt ellis- og røktarheim í Vági til 32 fólk.

Tað førdi Jógvan Krosslá, býráðslimur, fram á býráðsfundi í Vági fríggjakvøldið.

Hann vísti í hesum sambandi á, at eldraøkið verður lagt undir kommunurnar um fá ár.

Hann vísti somuleiðis á, at býráðið hevur áður søkt um stuðul til at byggja sambýlið út, so at pláss verður fyri 10 fólkum afturat.

Hann segði, at hetta er ein nógv bíligari og betri loysn, samstundis sum hann vísti á, at vit hava longu eitt heim til røktarsjúklingar í Suðuroy og at tað eru óráð at hava tvey stór røktarheim.

Stúrt varð eisini fyri, at eitt ellisheim fer at gera tað neyðugt at hække skattaprosentið minst eitt prosent.

Kirstin Strøm Bech vísti á, at fyri kommununa er lítil munur á at byggja eitt røktarheim til 32 fólk og at byggja sambýlið út til 10 fólk.

– Landið letur 500.000 krónur í stuðuli til hvørt røktarheimspláss, men bara 50.000 krónur til hvørt pláss á sambýli.

Tað kostar 10 milliónir at byggja sambýlið út til 10 fólk afturat. Tað merkir, at kommunan skal sjálv fíggja 9,5 milliónir.

Harafturat kostar sambýlið kommununi eina millión um árið í rakstri.

Byggja vit ellis- og røktarheim til 32 fólk, verður parturin hjá Vágs Kommunu 14 milliónir, men kommunan betalir onki av rakstrinum.

Og avdráttirnir verða eina góða millión um árið, so alt í alt er lítil munur á.

Hon vísti eisini á, at alt ávirkar skattaprosentið, men eitt ellisheim skuldi eisini givið kommununi fleiri inntøkur.

Svenning Borg vísti á, at tilboðið frá landsstýrinum var sera gott og at eitt slíkt ellis og røktarheim hevði verið fyrsta, stóra, almenna arbeiðspláss í Vági og tí er talan um eitt rættiligt frambrot.

Og her er talan um trygg arbeiðspláss, sum ikki eru tengd at veðri, streymi og fiskaloysi.

Sølvi Andreasen vísti á, at landsstýrismaðurin í almanna-og heilsumálum hevur gjørt greitt, at eldraøkið verður í øllum førum ikki lagt út til kommunurnar at umsita so leingi tað er so ójavnt við tilboðum til eldri kring landið.

Og í øllum førum verður eldraøkið ikki lagt undir kommunurnar í hesum valskeiðnum.

# Stjóri og leiðari staðfestir

**Stýrið í SEV staðfesti fríggjadagin setanina av fyribils leiðara og raktrarleiðara í SEV. Ongin stýrislimur mælti ímóti, sigur Kim Durhuus**

SEV-ÓSEMJA
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

SEV stýrið hevur nú endaliga staðfest, at John P. Danielsen skal vera fyribils stjóri í SEV og at Jón Nielsen skal vera fyribils rakstrarleiðari.

Tað gjørdi SEV stýrið á fundi fríggjamorgunin.

Nýggjur stjóri er settur í SEV fyribils eftir at meirilutin í stýrinum bað Klæmint Weihe, stjóra fara til hús, samstundis sum hann fekk ætlanarskriv um at verða sagdur úr starvi.

Men stýrið skuldi endaliga góðkenna fyribilsstarvssetanirnar og tað gjørdi stýrið fríggjadagin.

Herfyri gjørdi meirilutin í stýrinum av at Leivur Hansen skuldi fara frá sum stýrisformaður og ístaðin varð Kim Durhuus valdur til stýrisformann.

Og tað var Kom Durhuus, sum sat við borðendan á fundinum fríggjadagin.

Hann sigur, at stýrisfundurin í dag var rættiliga friðarligur.

– Tað gekk fínt, sigur hann.

Spurdur um stýrið varð samt um at góðkenna starvssetanirnar, svarar hann soleiðis:

– Tað var so ongin, ið atkvøddi ímóti.

Annars metir Leivur Hansen seg enn at vera stýrisformann. Hann hevur kært avgerðina um at koyra hann frá fyri umboðsnevndini og fyrrrenn hon hevur talað, kann stýrið ikki umskipast, sigur hann.



Frá vinstru Leivur Hansen, Suni í Hjøllum og Kim Durhuus á stýrisfundi fríggjadagin, at tað varð staðfest, at fyribils leiðsla er sett í SEV